tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tværávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið

**Dagfesting:** 29.01.2026 kl. 17:00
**Málnr.:**

Nevndarlimir: Kristin Michelsen, Anita Vibergsdóttir, ~~Alvi Mortensen~~, Barbara Michalina Tausen, ~~Bjarni Hammer~~, Eyð Jóna Eidesgaard, Arnfinn Bech

Varalimir: Tóki Justinussen

Ikki møtt:

Onnur:

Nevndarskrivari: Fróði Mortensen

| **Málsyvirlit** | | |
|---|---|---|
| **Til støðutakan** | | |
| 1/26 | 26/00016-1 | Bygging sum ikki krevur byggiloyvi |
| 2/26 | 26/00018-1 | Reingerðartænasta til eldri borgarar |
| 3/26 | 25/00026-1 | TB Tvøroyrar Bóltfelag -ynskið um fótbóltshøll við Stórá |
| 4/26 | 21/00460-2 | FSR -umsókn um stuðul til bygging av nýggjum neysti á Hvítanesi |
| 5/26 | 26/00022-1 | Gl. Kgl. Handilin -"Krambúðin" ætlanir framyvir |
| 6/26 | 26/00004-1 | Felags fundur við kommunur um bygging av heilsudepil á Tvøroyri |
| 7/26 | 21/00027-5 | Dugni í Suðuroy |
| **Til kunningar** | | |
| 1/26 | 26/00001-1 | Kunning um skattainntøkur 2026 |
| | | |

**Kunning til býráðið:**
Kristin Michelsen, borgarstjóri setur fundin, og kunnar um, at Alvi Mortensen hevur fráboðað, at honum berst frá at møta til býráðsfundin í dag 29 Januar 2026, og hevur hann heitt á Tóka Justinussen, ið er fyrst valdi tiltakslimur á *"lista T, Felagslistin"* til kommunustýrisvalið 20. november 2024, um at møta fyri seg. Tóki Justinussen hevur havt sæti í býráðnum hetta valskeiði, og verður tí at taka sæti til býráðsfundin 26. juni 2025, uttan atkvøðugreiðslu.

Og Kristin Michelsen, borgarstjóri kunnar um, at Bjarni Hammer hevur fráboðað, at hann liggur veðurfastur í Havn, og berst frá at møta til býráðsfundin í dag 29. Januar 2026.

**Skrá og viðmerkingar til hesa:**
Kristin Michelsen, borgarstjóri lesur skránna til fundin í dag 29. Januar 2026, og kunnar um at enn eitt mál er komið á skrá.

Mál komi á skrá:

1. 21/00027-5 “Dugni í Suðuroy”

Kristin Michelsen spyr um viðmerkingar eru til skránna – ongin viðmerking.

**Til støðutakan**

## 1/26
## 26/00016-1 Bygging sum ikki krevur byggiloyvi

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 12.01.2026 | 2/26 |
| 2 Fíggjarnevndin | 23.01.2026 | 2/26 |
| 3 Býráðið | 29.01.2026 | 1/26 |

**Málslýsing:**
Í BK17 kap. 1.3 er ásett, at bygging kann ikki fara í gongd uttan skrivligt loyvi frá kommunala byggimyndugleikanum. Eisini er ásett:

- at kommunali byggimyndugleikin kann gera reglur fyri smærri byggingar, soleiðis at hesar ikki krevja byggiloyvi, um bygt verður eftir reglunum. Talan er um antennur, smærri vindmyllur, skeltir, sólskjól, terassur, lívdarskjól og tílíka smærri bygging.
- at kommunali byggimyndugleikin ger reglur fyri, nær umbygging, afturatbygging og umvæling krevur byggiloyvi.

**Lógargrundarlag:**
Føroyska bygningskunngerðin (BK17)

**Fíggjarligar avleiðingar:**
Ongar

**Tilmælið:**
Tekniska deild mælir til at gera líknandi samtykt sum hjá øðrum kommununum í Føroyum, at fylgjandi arbeiðir kunnu gerast uttan byggiloyvi, við teimum treytum sum eru nevndar niðanfyri og treytað av:

- at ásetingar í byggisamtyktum verða yvirhildnar  (herundir fríøki)
- at ásetingar í skeytinum verða yvirhildnar
- at ásetingar í Bygningskunngerðini (BK17) verða yvirhildnar

Tað er ábyrgdin hjá tí sum byggir at syrgja fyri at yvirhalda allar ásetingar. Eru ivamál ella spurningar, eigur tann sum byggir at venda sær til kommunala byggimyndugleikan.

Umsókn um byggiloyvi skal kortini altíð sendast, um:

- serstøk byggisamtykt er galdandi fyri økið, har bygt verður
- bygt verður í neystaøki, øki til frítíðarhús, húsvognar og tjalding
- bygt verður í økjum sum krevja loyvi frá øðrum myndugleikum – td. framvið landsvegi og í økjum sum koma undir náttúrufriðing.

Fráboðast skal á kommunuskrivstovuni um ætlaða bygging eftir hesi vegleiðing.

**Yvirlit yvir arbeiði, sum ikki krevja byggiloyvi:**
Smáir bygningar upp til 10 m2 sum ikki eru upphitaðir, sum t.d. úthús, drívhús, hjallar og líknandi, treytað av:

- at tað í mesta lagi eru 2 stk. tílíkir bygningar á matrikklinum
- at frástøðan til aðrar bygningar á sama matrikli skal í minsta lagi vera 2,5 m (BK17 2.2.3.5)
- at frástøðan til mark er minst 1 m
- at hædd á útveggum ella tekju yvir planeringshædd kann í mesta lagi vera 2,5 m (BK17 2.2.3.5)

Broyting av innrætting í sethúsum, tvíhúsum og líknandi, treytað av:
- at vatn og kloakk ikki er partur av broytingini
- at brunakrøvini verða yvirhildin (BK17 kap. 5)
- at hetta ikki ávirkar berandi konstruktiónirnar (BK17 kap.)

Altanir upp til 5 m2 vídd, treytað av:
- at altanin er 2,5 m frá marki (BK17 kap.)

Útskiftan av taki og útveggjaklæðing, treytað av:
- at orkuparturin í BK17 verður yvirhildin (BK17 kap. 7.4.2)

Útskiftan av vindeygum, úthurðum, portrum v.m., treytað av:
- at orkuparturin í BK17 verður yvirhildin (BK17 kap. 7.4.2)
- at kravið um bjargingarop (BO) verða yvirhildin (BK17 kap. 5)

Smáar antennur og parabolar upp til 1 m í diametur

Garðar við hædd upp til í mesta lagi 1,5m, íroknað rekkverk

Hátún, lehegn, heitir pottar og líknandi

Brenniovnar, treytað av:
- at Sløkkiliðið skal sýna brenniovnin áðrenn hann verður tikin í brúk.

Niðurtøka av bygging minni enn 50 m², treytað av:
- at vegleiðingin um niðurtøku av bygging á heimasíðuni hjá kommununi verður yvirhildin.

**Tekniska nevnd 12. januar 2026:**
Nevndin tekur undir við tilmælinum frá umsitingini. Málið verður beint í Fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 23. januar 2026:**
Einmælt samtykt tilmælið hjá Teknisku nevnd.

**Býráðið 29. januar 2026:**
Einmælt samtykt tilmælið hjá Teknisku nevnd og fíggarnevndini.

**2/26**
**26/00018-1 Reingerðartænasta til eldri borgarar**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Sosiala nevnd | 14.01.2026 | 3/26 |
| 2 Fíggjarnevndin | 23.01.2026 | 3/26 |
| 3 Býráðið | 29.01.2026 | 2/26 |

**Málslýsing: Kommunustjórin 9.1.2026**
Forkv. í sosialu nevnd Anita Vibergsdóttir ynskir at nevndin viðgerð ætlan um at veita reingerðartænastur til eldri borgarar í kommununi.

**Nakrar kommunur veita reingarðar tænastu til eldri borgara**
**Tórshavnar kommuna.**

*Fólkapensjónistar, ið ikki megna at gera reint sjálvir, og sum ikki búgva saman við frískum hjúnafelaga/maka ella vaksnum (yvir 18 ár), ið megna at gera reint.*

*Vanliga verður reingerð bert játtað til borgarar, sum frammanundan fáa heimatænastu frá H&U. Um ein hevur ansara, verður reingerð ikki játtað.*

*Játtan til reingerð er treytað av, at visitator metir, at tørvur er á reingerðarhjálp.*

*Um visitator metir, at borgarin við miðvísari venjing kann endurvinna førleikan at gera reint sjálv/ur, fær borgarin í boði at venja hesar førleikar saman við starvsfólkum í Heilsuhúsunum. Borgarin.*

**NBH Norðoyar bú- & heimatænasta**

*Vitandi um, at fleiri borgarar aftra seg við at keypa sær reingerðartænastu vegna gjaldið, tey mugu rinda, hevur stýrið fyri Norðoya Bú- og Heimatænastu samtykt at veita stuðul til reingerð til teir fólkapensjónistar, ið einans hava vanliga fólkapensjón sum inntøkugrundarlag og ein mettan tørv á stuðli til reingerð.*

*Fíggjarligi stuðulin fevnir um reingerð svarandi til í mesta lagi ein tíma um vikuna.*

*Við stuðli frá NBH verður brúkaragjaldið fyri reingerðina 150 kr um tíman.*

*NBH hevur gjørt avtalu við reingerðarfyritøkuna Sp/f Grundvask v/ Margit og Sámal Petur í Grund um at veita reingerðartænastuna.*

*Til ber at søkja um fíggjarligan stuðul til reingerðartænastu við at venda sær til tel. 793400, yrkadagar millum kl. 8.00 til 15.00, ella við at útfylla umsóknarblaðið við at trýsta á knøttin niðanfyri.*

*Tá ið NBH hevur móttikið umsóknina, verður umsóknin latin visitator í NBH, sum kemur at vitja fyri at meta um førleika og tørv. Játtan til stuðul er treytað av, at visitator metir, at tørvur er á reingerðarhjálp.*

**Vágs- & Sumbiar kommuna.**

*Reingerðartænastan er ætlað borgarum, sum eru 67 ár ella eldri, og sum búgva í egnum heimi. Tankin við tænastuni er at hjálpa borgarum, sum ikki eru førir fyri sjálvir at gera reint.*

*Reingerðartænastan fevnir um viðlíkahaldsreingerð, tvs. støvsúgving og vask av gólvum og baðirúmi. Høvuðsreingerð er ikki við, men um tað er neyðugt áðrenn tænastan kann setast í verk, so fær borgarin boð og rindar kostnaðin fyri reingerðina. Reingerðartænastan verður veitt í styttri ella longri tíðarskeið.*

*Treytin er, at viðkomandi ikki er førur fyri at gera reint sjálvur, og ikki býr saman við persóni, sum er yvir 18 ár og kann gera reint. Vágs Kommuna ger av, hvør hevur rætt til reingerðar-tænastuna. Reingerðar-tænastan verður bert veit til ein persón í hvørjum húsarhaldi.*

***Kostnaður***

*Tað kostar borgaranum (Vágur kr. 300,-., Sumba kr. 312,50) fyri hvørja reingerð. Tá hevur Vágs Kommuna goldið helvtina av kostnaðinum til reingerðar-fyritøkuna. Reingerðin svarar til tveir arbeiðstímar og gjørt verður reint triðju hvørja viku.*

*Avtala er gjørd millum Vágs Kommunu og tvær reingerðar-fyritøkur, borgarin ger sjálvur gera av, hvønn veitara viðkomandi ynskir. Sumba hevur avtalu við eina fyritøkur.*

**Eldri borgarar í Tvøroyrar kommuna sep. 2025.** ***(kelda Hagstovan)***



**Lógargrundarlag:**
Kommunufulltrúin

**Fíggjarligar avleiðingar:**
FÆ2026, §222 eru avsettar kr. 250.000,- til veitan av reingerðarhjálp til eldri.

**Tilmælið:**
Tvøroyrar kommuna hevur onga sosiala deild, og tí eigur reingerðartænastan at skipast við greiðum ábyrgdarbýti. Tænastan kann annaðhvørt verða útveitt til Bú- og Heimatænastuna í Suðuroy (BHS) at umsita, ella umsitast av umsitingini hjá Tvøroyrar kommunu. Sjálv reingerðin verður útinnt av einari reingerðarfyritøku eftir avtalu, og eftir meting av óheftum fakpersóni/visitator, sum metir um tørvin hjá borgarum og stendur fyri eftirmeting og kvalitetstrygging av tænastuni.

Vísandi til kommunustýrisskipanina fyri Tvøroyrar kommunu verður uppskotið við hesum latið sosialu nevnd og møguliga býráðnum til støðutakan.

**Sosiala nevnd 14. januar 2026:**
Forkv. mælir til, at umsitingin kannar hvørji feløg kunna veita hesa tænastuna á Tvøroyri, har kommunan veitir ískoyti til reingerð til borgarar, sum eru 67 ár ella eldri ájavnt við ímesta lagið tveir arbeiðstímar, og at ískoyti verður veitt til reingerð triðju hvørja viku. -Einmælt samtykt

**Fíggjarnevndin 23. januar 2026:**
Einmælt samtykt tilmælið hjá sosialu nevnd, har tænastan verður boðin út millum lokalar reingerðar fyritøkur/fólk, og at umsitingin verður heimila at gera avtalu við veitarar.

**Býráðið 29. januar 2026:**
Forkvinna í sosialunevndini greiðir frá uppskotinum. Borgarstjórin mælir til at samtykkja tilmælið hjá sosialu nevnd og fíggjarnevndini, og at heimila umsitingini at gera avtalu við veitarar. Borgarstjórin mælir eisini til at taka upp samskiftið við BHS um, hvørt tænastan kann umsitast av BHS. -Einmælt samtykt.

**3/26**
**25/00026-1 TB Tvøroyrar Bóltfelag -ynskið um fótbóltshøll við Stórá**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Mentanarnevndin | 11.02.2025 | 11/25 |
| 2 Fíggjarnevndin | 24.02.2025 | 15/25 |
| 3 Mentanarnevndin | 07.04.2025 | 39/25 |
| 4 Mentanarnevndin | 08.10.2025 | 89/25 |
| 5 Fíggjarnevndin | 23.01.2026 | 8/26 |
| 6 Býráðið | 29.01.2026 | 3/26 |

**Málslýsing: Kommunustjórin14.01.2025**
Form. í Tvøroyrar Bóltfelag -André Dalfoss- hevur vent seg til umsitingina við tankum/ynskið um at ein fótbóltshøll verður uppsett á matr. nr. 144a, ið er eystan fyri verandi vøllin við Stórá.

Tað er enn ikki greitt hvat kostnaðurin verður ella hvussu fíggingin verður

Form. í TB er enn ikki greiðir um hvat kostnaðurin verður. Sagt verður at talan eru um fleiri møguligar loysnir, sum dekka tørvin og ynskið hjá TB, og verður víst m.a. í eina "small size" høll í Hafnarfjörði.

Um farast skal víðari við hesum tonkum/ynskið, tørvar TB í fyrsta umfari, at hoyra um Tvøroyrar kommuna er jalig fyri hesari ætlan, og um kommunan er sinnað at lata eina fótbóltshøll byggja á økinum við Stórá.

**Lógargrundarlag:**
Kommunufulltrúin

**Fíggjarligar avleiðingar:**
Tað er enn ikki greitt hvat kostnaðurin verður ella hvussu fíggingin verður, hetta velst m.a. um hvørjar møguligar loysnir kunna fremjast.

**Tilmælið:**
Vísandi til kommunustýrisskipanina fyri Tvøroyrar kommunu verður uppskotið við hesum latið mentanarnevndini og møguliga býráðnum til støðutakan.

**Mentanarnevndin 2025-2028 11. februar 2025:**
André Dalfoss møtti til fundin at greiða frá ætlanum um at uppsetta eina høll á ítróttarøkkinum í Trongisvági. Mentanarnevndin er jalig fyri uppskotinum og heitur á TB um at arbeiða víðari við málinum.

**Fíggjarnevndin 2025-2028 24. februar 2025:**
Málið umrøtt og kunnað.

**Kommunustjórin 02.04.2025:**
Form. í Tvøroyrar bóltfelag, hevur sent umsitingin upplýsingar/tilboð uppá høll, Goal Station v.m. Padel bana.

Tilboð 2889.pdf
Talan er um Padel bana ink. ljós kr. 0,4mió
Tilboð 2906.pdf
Talan er um Goal station vøll v.m kr. 2,4mió.
Tilboð 2905.pdf
Telthall 30x65x6 kr. 4.5mió

**Íalt** **kr. 7,3mió íroknað mvg *(kr. 5,8 mió ex. mvg)***

**Mentanarnevndin 07. april 2025:**
Forkv. mælir til at kommunustjórin kannar hvørjar líknandi høllir eru, í Føroyum ella í Norðanlondum, har nevndin kann vitja fyri at fáa nærri vitan um tørv og loysnir. Játtan til kunningarferð verður funnin av §411. -Einmælt samtykt.

**Mentanarnevndin 08. oktober 2025:**
Málið var umrøtt og kunnað. -Einmælt samtykt, ikki at fara víðari við fyriliggjandi uppskot fyribils, at byggja eina fótbóltshøll á matr. nr. 144a, ið er eystan fyri verandi vøllin við Stórá. -Málið verður møguliga tikið upp seinni.

**Kommunustjórin 15.01.2026:**
Umsitingin hevur hin 14. Januar 2026, móttikið teldupost frá Kristin Dam Ziska, aðalskrivari í Fótbóltssamband Føroya við kunning til allar kommunur um:

*FSF bjóðar kommununum at søkja stuðul til bygging av fótbóltshallum (bæði fullstødd og smærri 9ara/7ara hallir), sum liður í at menna fótbóltin alt árið.*

*Stuðulin kemur úr FIFA Forward 3.0 og kann vanliga vera 15–20% av samlaða kostnaðinum (í serstøkum førum meir). FSF kann íalt søkja um 19 mió. kr. í hesum umfari, og stuðul verður fyrst og fremst latin til verkætlanir í 2026–2027.*

*Freist: Kommunur við áhuga skulu boða FSF frá í seinasta lagi 2. mars 2026, við upplýsingum um høllslag, staðseting, yvirskipaða tíðarætlan og kostnaðarmeting, og vátta at verkætlanin er ætlað at verða framd í 2026/2027.*

*FSF fer síðani at meta um innkomnar fráboðanir og boða aftur við, hvussu stóran stuðul tey kunnu lata.*

*Treytir: Verkætlanir skulu lúka krøvini í FIFA Forward 3.0, og kommunan hevur ábyrgd av skjalprógvi og at treytir verða fylgdar.*

**Fígging:**
Ongin játtan er avsett til bygging av høll, ið lúkar krøvini í FIFA Forward 3.0, men kr. 300.000,- eru avsettar til at byggja uppí verandi ítróttarhøll eystureftir, soleiðis at pláss verður til eina hálva venjingarhøll til ítróttarvirksemið, fundarhølir til feløgini, sum hava sítt virksemi í Ítróttarhøllini, umframt goymslu. (Mál: 25/00113 og 26/00036)

**Fíggjarnevndin 23. januar 2026:**
Fíggjarnevndin samtykkir einmælt, at heimila teknisku deild at arbeiða víðari við einari ætlan at staðseta eina høll, ið lúkar krøvini hjá FIFA Forward 3.0 á økinum við Stórá, har verkætlanin lúkar krøvini sum FSF setur til søkja um stuðul. – játtanin verður veitt sum eykajáttan av innistandandi

**Býráðið 29. januar 2026:**
Borgarstjórin greiddi frá møguleikanum at byggja fótbóltshøll við stuðul frá FSF. Borgarstjórin mælir til at heita á og heimila teknisku deild at kanna staðsetingar, tørv og kostnað av einari høll, og søkja FSF um stuðul til at byggja eina fótbóltshøll. -einmælt samtykt

**4/26**
**21/00460-2 FSR -umsókn um stuðul til bygging av nýggjum neysti á Hvítanesi**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 7 Fíggjarnevndin | 23.01.2026 | 16/26 |
| 8 Býráðið | 29.01.2026 | 4/26 |

**Málslýsing: (Kommunustjórin 20.05.2021)**
Umsitingin hevur í eina tíð samrátt við nevndina í FSR Froðbiar Sóknar Róðrarfelag, um bygging av nýggjum kappróðrarneysti á Hvítanesi. Stuðulsavtala er gjørd, sum verður løgd fyri aðalfund í FSR til samtyktar 24. Nov. 2021, og um samtykt á aðalfundi hjá FSR verður henda eftirfylgjandi løgd fyri Tvøroyrar býráð til samtyktar.

Stuðulsavtalan er í 14. punktum. Samlaði byggikostnaðurin er kr. 10.320.000,- ex. mvg. Tvøroyrar kommuna stuðlar við kr. 6.5 mió. ex. mvg. Lokale og Anlægsfonden stuðlar við kr. 3.8 mió.

**Lógargrundarlag: kommunufulltrúin**

**Fíggjarligar avleiðingar: FÆ2022**

**Tilmælið:** Vísandi til kommunustýrisskipanina fyri Tvøroyrar kommunu verður uppskotið við hesum latið fíggjarnevndini og møguliga býráðnum til støðutakan.

**Fíggjarnevndin 25. oktober 2021:**
Borgarstjórin kunnar um, at aðalfundur hevur verði í FSR 24. okt., og hevur aðalfundurin samtykt stuðulssáttmálan við Tvøroyrar kommunu. Fíggjarnevndin mælir einmælt til, at býráðið samtykkir stuðulssáttmálan sum fyriliggur. Fíggarnevndin mælir einmælt til, at FSR og Tvøroyrar kommuna áseta ein av fyrst komandi døgum, eftir býráðsfundin 28. nov., har spakin verður ísettur til bygging av nýggjum kappróðrarneysti.

**Býráðið 28. oktober 2021:**
Einmælt samtykt tilmælið hjá fíggjarnevndini at stuðla FSR samb. fyriliggjandi stuðulssáttmála.

Val av limum í bygginevndina umboðandi Tvøroyrar kommunu.
Alvi Mortensen skjýtur upp at Jónleyg J. Bech og Kristin Michelsen vera fastir limir.
Jónleyg Jespersen Bech skjýtur upp at Alvi Mortensen verður varaumboð fyri Jónleyg Jespersen Bech og at Anita Vibergsdóttir verður varaumboð fyri Kristin Michelsen

Kristina Roest skjýtur upp at Bjarni Hammer verður fastur limur. Súsanna Bertholdsen skjýtur upp, at vara umboð fyri Bjarna Hammer verður Kristina Roest

**Kommunustjórin 04.11.2021**
Kommunustjórin og fíggjarleiðarin mæla til, -nú stuðulsavtalan millum Tvøroyrar kommunu og Froðbiar Sóknarróðrarfelag FSR er endaliga samtykt og undirskriva av báðum pørtum-, at stuðulsjáttanin, ið er avsett á FÆ2021, §525 á kr. 1.500.000,- verður flutta á depotkonto hjá FSR.

**Fíggjarnevndin 18. november 2021:**
Einmælt samtykt at stuðulin til FSR verður fluttur á depotkonto hjá FSR

**Býráðið 25. november 2021:**
Einmælt samtykt tilmælið hjá fíggjarnevndini frá 18. november 2021

**Kommunustjórin 3. februar 2024:**
Borgarstjórin ynskir at viðgerða skriv frá FSR dagf. 2. feb. 2024, ið nevndin í FSR hevur sent øllum býráðslimum og umsitingini.
Hetta er grunda á, at byggitíðin av nýggja neystunum dregur út, kostnaðurin økist, samstundis tørvar kommunan ræðisrættin yvir gamla neysti á Tippinum.

Samb. stuðulsavtaluni har kommunan hevur samtykt verkætlanarstuðul til bygging av kappróðrarneysti er m.a. ásett:

- §1,e) Samb. telduposti sendur til Tvøroyrar kommunu frá FSR, hin 10. Juni 2021 verður samlaði byggikostnaðurin kr. 10.320.000,- u/mvg. Og stuðuls kostnaðurin hjá Tvøroyrar kommunu kann í mestalagið vera kr. 6.500.000,-. U/mvg.
- §8.) FSR avhendar endaliga og løgliga gamla kappróðrarneystið staðsett á Tippinum matr. nr. 532e og 770b uttan kostnað til Tvøroyrar kommuna, tá hesin sáttmáli er undirskrivaður og góðkendur á aðalfundi í FSR. b.) FSR fær fullan nýtslurætt til gamla kappróðrarneysti umframt tey 3 gomlu neystini á Tippinum. Hesin rættur fellur tó burtur, tá nýggja neystið á Hvítanesi stendur liðugt eftir verandi og góðkendum byggitekningum.

Nevndin í FSR gerð vart við í skrivinum dagf. 2. feb. 2024, at FSR ynskir ikki, avhenda endaliga og løgliga gamla kappróðrarneystið staðsett á Tippinum matr. nr. 532e og 770b uttan kostnað til Tvøroyrar kommuna, uttan so, at Tvøroyrar kommuna letur FSR kr. 4,0 mió., í endurgjaldi afturaft latnum stuðuli á kr. 6,5 mió. til nýggja neysti.

Nevndin í FSR grundar hetta m.a. á, at nýggja neysti ikki stendur liðugt, og metur, at tað ber ikki til at byggja liðugt fyri verandi stuðul frá Tvøroyrar kommunu. FSR ynskir sostatt, at Tvøroyrar kommuna økir stuðulin við kr. 4.0 mió, svarandi til eina øking á 62%. Tvøroyrar kommuna letur sostatt í stuðul kr. 10,5 mió. til bygging av nýggja neystinum.

**Fíggjarnevndin 22. februar 2024:**
Borgarstjórin staðfestur, at Tvøroyrar kommuna hevur hildið allar ásetingar í stuðulsavtaluni millum Tvøroyrar kommunu og FSR, og borgarstjórin mælir til, at ásetingin í §8 *«Mótrokning»* fær fult og heilt gildið pr. 1. mars 2024, soleiðis at Tvøroyrar kommuna fær endaliga og løgliga gamla kappróðrarneystið staðsett á matr. nr. 532e og 770b uttan kostnað, og at nýtslurætturin til tey 3 gomlu neystini á Tippinum fellur aftur til Tvøroyrar kommunu 1. mars 2024. -einmælt samtykt.
Málið verður beint í býráðið

**Býráðið 29. februar 2024:**
Bjarni Hammer mælir til at nevndin í FSR skal hoyrast samsvarandi tilmælið hjá fíggjarnevndini 22. feb. 2024, áðrenn endalig avgerð verður tikin.
Fyri eru: Bjarni Hammer og Eyð Eidesgaard
Ímóti: Kristin Michelsen, Anita Vibergsdóttir og Alvi Mortensen
Blankt: Kristina Roest
**Uppskoti fallið.**

Anita Vibergsdóttir mælir til at taka undir við tilmælinum hjá fíggjarnevndini, og at FSR fær trygd fyri framhaldandi loyvið til at venja í ítróttardeplinum við Stórá, inntil flutt verður inn í nýggja neystið á Hvítanesi.
Fyri eru: Kristin Michelsen, Anita Vibergsdóttir, Alvi Mortensen, Kristina Roest og Eyð Eidesgaard
Ímóti: Bjarni Hammer
Blankt: ongin
**Uppskotið samtykt.**

**Kommunustjórin 20.01.2026**
Borgarstjórin ynskir at fíggjarnevndin umrøðir og viðgerða fyriliggjandi verkætlan at byggja nýtt kappróðrarneyst á Hvítanes, har kommunan upprunaliga skuldi stuðla verkætlanina við kr. 6.5mió. Seinast uppgerð vísir, at kommunan hevur latið fíggjarligan stuðul á uml. kr. 10 mió, og hóast hetta, er verkætlanin, ið byrjaði í 2021, enn ikki komin á mál.

**Fíggjarnevndin 23. januar 2026:**
Málið var umrøtt og kunnað. Borgarstjórin mælir til, at heita á FSR, um at fáa í lag fund við umboð frá LOA grunninum -sum áður er samtykt í bygginevndini-, har ein støðulýsing verður gjørd av manglum, kostnaði av hesum, og hvussu nógv verkætlanin hevur kosta higartil. Eisini ynskir fíggjarnevndin eitt yvirlit yvir hvør tøk játtan er eftir hjá FSR til at enda verkætlanina. -einmælt samtykt.

**Býráðið 29. januar 2026:**
Borgarstjórin kunnar um málið, og mælir býráðnum til at samtykkja tilmælið hjá fíggjarnevndini. - Einmælt samtykt.

## 5/26
## 26/00022-1 Gl. Kgl. Handilin -"Krambúðin" ætlanir framyvir

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Mentanarnevndin | 14.01.2026 | 13/26 |
| 2 Fíggjarnevndin | 23.01.2026 | 18/26 |
| 3 Býráðið | 29.01.2026 | 5/26 |

**Málslýsing: Kommunustjórin 12.01.2025**
Forkv. í mentanarnevndini ynskir at nevndin viðgerð framtíðar ætlanir við Gl. Kgl. Handilin - "Krambúðin".

**Lógargrundarlag:**
Kommunufulltrúin

**Fíggjarligar avleiðingar:**
Ongin ávís játtan avsett á FÆ2026

**Tilmælið:**
Vísandi til kommunustýrisskipanina fyri Tvøroyrar kommunu verður uppskotið við hesum latið mentanarnevndini og møguliga býráðnum til støðutakan.

**Mentanarnevndin 14. januar 2026:**
Forkv. í mentanarnevndini mælir til, at temadagur verður fyriskipaður fyri allar býráðslimir at viðgerða framtíðar ætlanir fyri Gl. Kgl. Handilin -"Krambúðin", Seglloftið og Faktorhúsið.  -Einmælt samtykt.

**Fíggjarnevndin 23. januar 2026:**
Fíggjárnevndin tekur einmælt undir við tilmælinum hjá mentanarnevndini, og mælir til at temadagur verður fríggjadagin/leygardagin 20/21. februar. Og at dagurin byrjar vit at vitja verður í Gl. Kgl. Handilin -"Krambúðini", Seglloftinum og Faktorhúsinum, og endar við einum betri bita. -málið verður beint í býráðið sum lukka mál.

**Býráðið 29. januar 2026:**
Einmælt samtykt at hava ein temadag 20. februar, kl. 09.00, og byrjar dagurin við felags morgunmati.

**6/26**
**26/00004-1 Felags fundur við kommunur um bygging av heilsudepil á Tvøroyri**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Felagsfundur -Tvøroyrar, Hvalbiar & Fámjin kommuna | 08.01.2026 | 1/26 |
| 2 Sosiala nevnd | 14.01.2026 | 1/26 |
| 3 Fíggjarnevndin | 23.01.2026 | 1/26 |
| 4 Býráðið | 29.01.2026 | 6/26 |

**Málslýsing: Kommunustjórin 5. Januar 2026.**
Eftir áheitan frá borgarstjóranum Kristin Michelsen, sum saman við kommunustjóranum hevur havt fund við borgarstjóran í Hvalbiar kommunu og borgarstjóran í Fámjin kommunu, hin 5. Januar 2026, varð avgjørt, at innkallaða kommunustýrini í Hvalba, Fámjin og Tvøroyri til ein felags fund, at viðgerða ætlanina at byggja eina heilsumiðstøð á Tvøroyri.

Hesar kommunur hava frammanundan samtykt at byggja ein nýggjan heilsudepil á Tvøroyri, sum er grundað á greið faklig tilmæli frá øllum verandi og komandi kommunulæknum í Suðuroynni. Kommunulæknarnir mæla beinleiðis frá at dagføra verandi heilsumiðstøðir og mæla heldur til eina nýggja felags læknamiðstøð fyri alla oynna.

Tvøroyrar, Hvalbiar og Fámjins kommunur hava tikið stig til verkætlanina, saman við arkitektum og við íblástri frá nýggjum miðstøðum aðrastaðni í Føroyum, og hava sent Heilsumálaráðunum umsókn um loyvið til at byggja nýggja heilsumiðstøð á Tvøroyri.

Heilsumálaráðið hevur avvíst umsóknina við tilvísing um, at sambært § 5 í Løgtingslóg nr. 66/2025 skulu allar kommunur í Heilsuøki 5 í felag senda uppskot um slíka bygging.

Tvøroyrar, Hvalbiar og Fámjins kommunur hava tí hin 5. desember 2025 sent hoyringar skriv til kommunurnar í sunnaru helvt av Suðuroynni, við tekningum og lýsing av verkætlanin at byggja eina heilsumiðstøð á Tvøroyri, sum kann rúma 5 kommunulæknum, og øllum teimum tænastum, sum tørvur er á at skipa heilsutænastur í nærumhvørvinum hjá borgaranum

Kommunurnar í sunnari hálvu hava svara hin 31.12.2025 -tó uttan at taka støðu til ætlanina at byggja eina nútímans heilsumiðstøð á Tvøroyri-. Svar: *citat "at tað er ein vælvirkandi og vælskipaður heilsudepil í Vági. Í hesum heilsudeplið eru tveir fastir kommunulæknar, sum eisini hava útbúgvingarlækna undir sær. Í dag eru longu fleiri heilsutænastir, sum styðja undir kommunulæknavirkseminum og sum veita tænastir til eitt nútíðarsamfelag. Víst verður á, at heilsudepilin er longu í trá við hugsanini hjá Heilsumálaráðnum við heilsudeplum í Føroyum, og heilsudepilin í Vági lýkur longu í dag fleiri av ynskjunum, sum læknanir hava víst á, og sum ætlanin hjá Hvalbiar, Fámjins og Tvøroyrar kommunum um at byggja ein heilsudepil eisini byggir á"*

**Viðmerking til ætlanina at dagføra og útbyggja heilsumiðstøðina í Vági**
Í hoyringarsvarinum undrar tað Tvøroyrar-, Hvalbiar- og Fámjins kommunum, at, at kommunurnar í sunnaru helvt hava arbeitt víðari við útbygging og dagføring av heilsudepilinum í Vági, og at arbeiðið longu er komið so mikið áleiðis, at stórur partur er projekterað, og at endamálið er at loysa heilsutørvin hjá kommununum og fyri Suðuroynna sum heild, uttan at allar kommunur eru í heilsuøkinum hava sent felags uppskot til landsstýrisfólkið um at byggja hølir, umbyggja ella útbyggja verandi hølir.

Eisini undrar tað Tvøroyrar-, Hvalbiar- og Fámjins kommunur, at ætlanin um at dagføra heilsudepilin í Vági ikki er í samsvari við fakliga tilmælið, sum varð lagt fram á fundinum í SALT tann 30. desember 2024. Har framgekk greitt, at verandi læknamiðstøðir í Vági og á Tvøroyri ikki eru hóskandi sum framtíðar loysnir, og at tað tí ikki er ráðiligt at dagføra verandi hølir. Læknarnir mæltu heldur beinleiðis til at byggja ein nýggjan, felags heilsudepil fyri alla oynna, har allir læknar og heilsustarvsfólk kunnu arbeiða undir einum taki, og framtíðartrygga ein vælvirkandi heilsudepil í Suðuroynni.

**Lógargrundarlag:**

Løgtingslóg nr. 66 frá 28. apríl 2025 um heilsutænastur í nærumhvørvinum og Kunngerð nr. 102 frá 27. mai 2025, verður ásett:

> ***§ 3.*** *Í hvørjum heilsuøki kring landið verða skipaðar ein ella fleiri heilsumiðstøðir, sum eru høli, har heilsutænastur í nærumhvørvinum, sambært hesi løgtingslóg, verða veittar.*
>
> *Stk. 2. Landsstýrisfólkið tekur, í samráð við kommunurnar í heilsuøkinum, avgerð um staðseting og tal á heilsumiðstøðum í heilsuøkinum.*
>
> *§ 5. Kommunurnar í heilsuøkinum senda í felag uppskot til landsstýrisfólkið um antin at byggja hølir, umbyggja ella útbyggja verandi hølir ella leiga hølir, undir hesum uppskot til at innrætta og staðseta hølir.*
>
> *Stk. 2. Metir landsstýrisfólkið, at tørvur er á at útvega hølir til heilsutænastur í nærumhvørvinum sambært hesi løgtingslóg ella víðka um verandi hølir, kann landsstýrisfólkið heita á kommunurnar í heilsuøkinum um at senda sær uppskot um bygging, umbygging ella útbygging ella uppskot um leigumál.*
>
> ***§ 6.*** *Landsstýrisfólkið góðkennir øll byggimál, umbyggingarætlanir og útbyggingarætlanir og leigumál, undir hesum uppskot til at innrætta hølini.*
>
> *Stk. 2. Landsstýrisfólkið er við í verkætlanini frá hugskotsuppriti til góðkenning. Heilsutrygd er við í verkætlanini frá tí, at góðkent er, til hølini verða tikin í nýtslu.*

Sambært lógarásetingum, krevur einhvør bygging- ella útbygging, at felags semja er millum allar sjey kommunurnar í Heilsuøki 5, sum sambært kunngerðini umfatar:
Tvøroyrar-, Hvalbiar-, Fámjins-, Hovs-, Porkeris-, Vágs- og Sumbiar kommunu.

**Fíggjarligar avleiðingar:**
-

**<u>Tilmælið til støðutakan</u>**
Hvalbiar, Fámjins og Tvøroyrar kommunur, verða at taka støðu til, hvørt tær ynskja taka av tilboðnum um at koma uppí verandi ætlan um heilsudepil í Vági, vísandi til hoyringarsvar dagf. 31.12.2025. *(Upplýsast skal at ongin kunning er um ætlanina at útbyggja heilsumiðstøðuna í Vági)*

**Ella**

Hvalbiar, Fámjins og Tvøroyrar kommunur, at halda áfram við fyriliggjandi verkætlan at byggja eina nýggja heilsumiðstøð á Tvøroyri, samsvar við fyriliggjandi ætlan.

Henda tekur ætlanin tekur støði í tilmælini hjá læknunum á fundinum í SALT 30.12.2024-, umframt íblástrarstúrinum, har vitja varð á viðtalunum/læknahúsum norðanfjørðs. (á Berjabrekku, Kirkjustræti, Runavík, Klaksvík og á Norðskála).

BRIM ark. hava tekna eitt uppskot til nýggjan heilsudepil, ið lúkar øll krøv og framtíðar tryggjar veiting av heilsutænastum í nærumhvørvinum til allar borgarar í Suðuroynni.

Henda verkætlan er framløgd fyri kommunulæknum í Suðuroynni o.ø í býráðssalinum á Tvøroyri.

**Viðmerkingar til tilmælið og møguligt samstarv um heilsudepil í Vági**
Kommunurnar í sunnaru helvt hava kunna um, at tær eru sinnaðar at tosa við Hvalbiar, Fámjins og Tvøroyrar kommunur, skuldu kommunurnar verið áhugaðar at komi uppí ætlanina við einum heilsudepli í Vági.

Við hesum skulu Tvøroyrar-, Hvalbiar- og Fámjins kommunur taka atlit til, hvørt tilmælini og ynskini frá kommunulæknunum í Suðuroynni verða gingin á møti -og meta um tørvurin hjá borgarum í kommununum verður røktur og rokkin á ein nøktandi hátt.

Eisini skulu kommunurnar taka atlit til, hvørt tað fyriliggur ein *møgulig ætlanin hjá Heilsumálaráðnum at staðseta <u>eina</u> felags heilsumiðstøð fyri alt Heilsuøki 5.* Um so er, má hugsast um, hvar tað fakliga, geografiskt og skipanarliga besta staðið er at staðseta eina nýggja heilsumiðstøð fyri alla Suðuroynna.

**Grundgevingarnar fyri at staðseta hesa á Tvøroyri eru fleiri:**
- Tvøroyri liggur miðsavnandi í oynni og er tað staðið, har flest fólk í Suðuroynni búgva.
- Á Tvøroyri er frammanundan undirstøðukervi, ið fevnir um sjúkrahús, røntgen, CT-skanning, rannsóknarstovur, apotek ect.
- Hetta tryggjar bæði fakligt samanhang og kostnýttuvirði av dýrum tólum, fakfólkum, starvsfólkum innan heilsuøkið, og gevur møguleika fyri samansjóðaðum og framkomnum tænastum.

Tvøroyrar-, Hvalbiar- og Fámjins kommunur mæla til, at allar sjey kommunurnar í Heilsuøki 5 samráðast við landsstýrisfólkið í heilsumálum -samsv. § 3, stk. 2 í Løgtingslóg nr. 66/2025, har ásett er, at landsstýrisfólkið, í samráð við kommunurnar í heilsuøkinum, tekur avgerð um staðseting og <u>tal</u> á heilsumiðstøðum í heilsuøkinum.

**Felags loysn og nýggjur fundur**

Tvøroyrar-, Hvalbiar- og Fámjins kommunur bjóða øllum kommunum í Suðuroynni til ein nýggjan fund, har allar kommunurnar í Heilsuøki 5, har kommunulæknar og onnur heilsufakfólk verða hoyrd. Endamálið er at finna eina nútímans og fakliga grundaða felags loysn, sum tryggjar eina haldføra og

dygdargóða heilsuskipan fyri alla Suðuroynna, ið lúkar øll krøv og framtíðar tryggja veitingar av heilsutænastum í nærumhvørvinum til allar borgarar í Suðuroynni.

Vit bjóða tí til ein **felags fund** við øllum kommununum í Heilsuøki 5 (og við luttøku av viðkomandi fakfólki og/ella Heilsumálaráðnum, um tað ber til), við tí endamáli at:

- savna træðrirnar í einum felags leisti,
- fáa eina greiða felags støðu, og
- leggja fram eitt felags uppskot, sum samsvarar við krøv og fakligar fortreytir.

Við vón um felags semju og gott samstarv.
**Tvøroyrar kommuna**

Kristin Michelsen, borgarstjóri

**Hvalbiar kommuna**
Janus Thomsen, borgarstjóri

**Fámjins kommuna**
Jóanis Lisberg, borgarstjóri

**Felagsfundur -Tvøroyrar, Hvalbiar & Fámjin kommuna 08. januar 2026:**
Borgarstjórarnir mæla til, at Tvøroyrar, Hvalbiar og Fámjins kommunur halda fram við fyriliggjandi ætlan um at byggja eina nýggja tíðarhóskandi heilsumiðstøð í Suðuroynni, samsvarandi tí arbeiði og teimum fyrireikingum, sum longu eru framdar, og samsvarandi fyriliggjandi uppskot, sum eisini tekur støði í tørvslýsing hjá kommunulæknum vísandi til fundin 30.12.2024, og sum lúkar øll krøv og framtíðar tryggja veitingar av heilsutænastum í nærumhvørvinum til allar borgarar í Suðuroynni. **-einmælt samtykt**

**Sosiala nevnd 14. januar 2026:**
Málið var umrøtt og kunnað.

**Fíggjarnevndin 23. januar 2026:**
Fíggjarnevndin mælir einmælt til, at heimila umsitingina at heita á landstýriskvinnuna í Heilsu -og almannamálaráðnum um loyvið at fremja ætlanina at byggja eina nýggja tíðarhóskandi heilsumiðstøð í Suðuroynni, samsvarandi tí arbeiði og teimum fyrireikingum, sum longu eru framdar, og samsvarandi fyriliggjandi uppskot, sum eisini tekur støði í tørvslýsing hjá kommunulæknum vísandi til fundin 30.12.2024, og sum lúkar øll krøv og framtíðar tryggja veitingar av heilsutænastum í nærumhvørvinum til allar borgarar í Suðuroynni.

**Býráðið 29. januar 2026:**
Einmælt samtykt tilmælið hjá fíggjarnevndini.

**7/26**
**21/00027-5 Dugni í Suðuroy**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 8 Fíggjarnevndin | 05.11.2025 | 106/25 |
| 9 Býráðið | 29.01.2026 | 7/26 |

**Málslýsing: (kommunustjórin 04.05.2021)**

Dugni hevur avgjørt at seta á stovn deild í Suðuroynni, og hevur í hesum sambandi sett deildarleiðara og starvsfólk í starv.

Kommunustjórin og borgarstjórin hava í hesum sambandi samskift við stjóran á Dugna, og mæla til at starvsfólk hjá Dugna í Suðuroynni fær atgongd til skrivstovu og goymslu hølið hjá Tvøroyrar kommunu fyri at koma í gongd við virksemið.

**Sosiala nevnd 11. maj 2021:**
Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá umsitingini

**Býráðið 27. maj 2021:**
Kristin Michelsen mælir til at Dugni fær innivist hjá Tvøroyrar kommunu fyribils til 31.12.2020. Har eftir verður málið tikið upp til nýggja viðgerð.
Einmælt samtykt.

**Kommunustjórin 2. nov. 2023:**
Dugni hevur fráboða, at tey ynskja at koma suður 15. nov, at møtast við TVK, fyri at endurskoða teirra staðseting í Suðuroynni, við atliti til at leiga hølir til teirra virksemið í Suðuroynni... Upplýst verður, at virksemið hjá Dugna í Suðuroynni, er komið á fíggjarlógina, og er ynskið hjá leiðsluni í Dugna, at leiga hóskandi hølir í Suðuroynni, og harvið fáa støðugar og fastar karmar at húsast.

Dugni hevur eftir vitjan hjá Tvøroyrar kommunu hin 15. nov. sent eina umsókn um leigu av Pakkhús 5 til virksemi við endurbúgving, og er ynskiligt at flyta inn í karmarnar 01. Jan 2024.

**Fíggjarnevndin 28. november 2023:**
Einmælt samtykt at borgarstjórin samskiftir við Dugna. Málið verður tikið upp til nýggja viðgerð.

**Býráðið 30. november 2023:**
Málið var umrøtt og kunna. Málið verður tikið upp til nýggja viðgerð á einum seinnum fundi.

**Fíggjarnevndin 18. januar 2024:**
Einmælt samtykt fyriliggjandi leigusáttmála dagft. 11. jan. 2024.

**Býráðið 25. januar 2024:**
Málið var umrøtt og kunnað

**Kommunustjórin 05. feb. 2024:**
Stjórin á Dugna hevur sett ynskið fram um at endurskoða ferðmetranar í leiguásttmálnum, sum tí er dagførdur samsvarandi hetta.

**Fíggjarnevndin 22. februar 2024:**
Einmælt samtykt at fyriliggjandi dagførdan dagf. 5/2-2024, leigusáttmála við Dugna.

**Kommunustjórin 6. okt. 2025:**
Elin Ludvig, stjori á Dugna hevur vent seg til Tvøroyrar kommunu, við ynskið um at leingja fyriliggjandi leigusáttmála Pakkhús 5, við 2 árum.
Í Leigusáttmálanum er áset í §3: *"Leigumálið byrjar tann 1.januar 2024. Eigarin kann ikki siga sáttmálan upp fyrr enn 1 ár er liðin og tá við freist uppá 3 mðr. Leigarin kann søkja um leingja av leigumálinum í upp til 24 mánaðir hvørja ferð"* og at *"leigarin kann siga sáttmálan upp við freist uppá tríggjar mðr., um viðurskiftini broytast somikið at leigarin ikki longur hevur brúk fyri hølinum"*

**Fíggjarnevndin 05. november 2025:**
Nevndin tekur undir við at leingja sáttmálan, og er opin fyri at leingja hann í upp til 5 ár.

**Býráðið 29. januar 2026:**
Einmælt samtykt at leingja leigusáttmálan við Dugna við 5 árum, við áheitan um at sáttmálin verður prístalsregulgraður.

**Til kunningar**

## 1/26
## 26/00001-1 Kunning um skattainntøkur 2026

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 23.01.2026 | 2/26 |
| 2 Býráðið | 29.01.2026 | 1/26 |

**Málslýsing: Kommunustjórin 06.01.2026**

### skattainntøkur (kunning)

**Endamál:** At kunna býráðið um gongdina í skattainntøkum hjá kommununi higartil í ár, sum kann samanberast við fíggjarætlan, og meta stutt um væntaðu gongdina fyri restina av árinum.

**Lógargrundarlag:**
Kommunustýrislógin

**Tilmælið:**
Vísandi til kommunustýrisskipanina fyri Tvøroyrar kommunu verður uppskotið við hesum latið fíggjarnevndini og býráðnum til kunning og støðutakan.

**Fíggjarnevndin 23. januar 2026:**
Málið vart umrøtt og kunnað

**Býráðið 29. januar 2026:**
Málið var umrøtt og kunnað.

Fundurin lokin kl. 17:50

Kristin Michelsen

Anita Vibergsdóttir

Tóki Justinussen

Barbara Michalina Tausen

~~Bjarni Hammer~~

Eyð Jóna Eidesgaard

Arnfinn Bech